Fra: Sigurð Ó. Vang
Til: Umhvørvismálaráðið
Cc: Hákun Djurhuus Jacobsen; Sigurd Lamhauge
Emne: Hoyringssvar hjá Landsverki til lógaruppskot um broyting í elveitingarlógini og ásetingar um fjarhita
Dato: 25. januar 2024 22:08:36
Vedhæftede filer: Outlook-ogn2ohhz.png

Umhvørvismálaráðið,

Hoyringssvar frá Landsverki (LV) til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita)

Viðv. ásetingum um fjarhita
LV sær í fleiri førum fjarhitaveiting sum eina góða loysn til orkuskifti fyri landsins bygningar. Yvirskipað er tað eisini jaligt, at lóggáva kemur innan økið og ein eftirlitsmyndugleiki.

Viðv. ítøkiligum greinum:
Viðv. § 15 j.
LV metir, at tað er jaligt at tað koma meginreglur um prísásetan. Nakað sum hevur manglað.

Viðv. § 16a.
LV metir, at tað er jaligt við hesi ásetingini og soleiðis fáa eitt greiðari innlit í útlátsviðurskiftini.

Viðv. § 22a.
Freistirnar tykast heldur teprar viðv. fráboðan og mótmæli.
Mæla harumframt til, at tað eigur at framganga týðiligt, at lendi, vegur ella líknandi skal afturbøtast í góðan stand og ikki bara áseting um endurgjald.

Bestu heilsur,

SIGURÐ Ó. VANG
deildarleiðari, verkætlanardeildin
+298 290 871 // www.landsverk.fo